# Konsertfelagið fær forvitnisliga vitjan

**Í døgunum 15.-18. februar fær Konsertfelagið forvitnisliga vitjan av kenda pólska klaverleikaranum, Elzbietu Wiedner-Zajac. Hon fer at framføra á konsertum kring landið og fer eisini at hava skeið við ungum føroyskum klavernæmingum**

VITJAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Elzbieta Wiedner-Zajac er fødd og vaks upp í Pólandi, men hevur búð í Eysturríki síðan 1979, har hon virkar sum klaverleikari og sum professari á Universitat fur Musik und darstellende Kunst í Wien.

Síðan hon í sínari tíð vann virðislønir í altjóða klaverkappingum í Pólandi, USA, Italia og Spania, hevur Elzbieta spælt konsertir í eitt nú Evropa, USA og Fjareystri – og fyri umleið 20 árum síðan vitjaði hon og hevði konsertir í Føroyum.

## Úr gloymskuni

Í gylta salinum í Wien (Grosser Musikvereinssaal) hevur hon fleiri ferðir verið solistur í verkum fyri klaver og orkestur eftir landsmann sín, Frederic Chopin.

Elzbieta Wiedner-Zajac hevur leikt til nógvar útvarps- og sjónvarpsupptøkur og er eisini at hoyra á fleiri solofløgum. Tær hava verið nógv róstar av ummælarum.

Umframt at framføra mong av teimum gitnu og týðandi verkunum úr klaverbókmentunum, dámar henni eisini væl at spæla verk, sum eru farin í gloymskuna av órøttum.

## Skrivar tónleik

Í 1999 fór Elzbieta sjálv undir at skriva tónleik. Hennara konsertdebut sum tónaskald fór fram í listarhúsinum Alte Schmiede í Wien í mars 2004 og var fyriskipað av eysturríkska felagnum fyri samtíðartónlist.

Póland handaði listarkvinnuni Elzbietu Wiedner-Zajac medalju fyri hennara "Starv fyri pólskari mentan" (1990) og offiserkrossin "Polonia Restituta" (1994). Í 2000 handaði eysturríkski forsetin henni "Eysturríkska heiðurskrossin fyri vísindi og list".

## Næmingaskeið

Umframt at framføra sjálv, fer Elzbieta at hava skeið við føroyskum klavernæmingum á vitjanini í Føroyum. Hetta verður ein sokallaður master-class, har høvið býðst hjá øðrum at lýða á. Skeiðið verður leygardagin 17. februar frá kl. 14.00 til 16.30 á Tórshavnar Musikkskúla.

Ókeypis atgongd er til hetta tiltakið.

Á konsertunum í Føroyum fer hon at framføra egnan tónleik og verk eftir Beethoven, Schubert og Chopin.

Annars verða tiltøkini á vitjanini hesi: Hóskvøldið 15. februar kl. 19.30 (Mentanarhúsið í Fuglafirði/ konsert), leygardagin 17. februar kl. 14.00-16.30 (Masterclass á Tórshavnar Musikkskúla/ ókeypis atgongd), sunnudagin 18. februar kl. 16.00 (Norðurlandahúsið/ konsert).

Atgongumerki á 80 krónur fáast við dyrnar, men skúlanæmingar hava ókeypis atgongd.



*Hóskvøldið verður fyrsta tiltakið við Elzbietu Wiedner-Zajac, tá hon fer at hava konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði*


Starvslýsing

Trivnaðartænastan

**Pedagogur til Sambýlið á Líknargøtu 1, Runavík**

Søkt verður eftir pedagogi til setan 1. mars 2007 ella eftir nærri avtalu.
Ynskiligt er, at viðkomandi hevur vitan um autismu. Sambýlið er eitt heim, har 3 ungir menn við diagnosuni autismu búgva. Arbeiðið fevnir millum annað um at skipa gerandisdagin og frítíðina saman við teimum og verandi starvsfólkum. Dentur verður lagdur á, at tann ið sett/ur verður, er likamliga væl fyri og er áhugað/ur at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan.

Talan er um fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi kvøld-, náttar- og vikuskiftisvaktir. Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Sambýlið á Líknargøtu 1.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Starvsøkið umfatar eisini Sambýlið á Rúnarvegi 3 og Bústovnin á Rúnarvegi 6 í Runavík, ið eru undir somu leiðslu sum Sambýlið á Líknagøtu 1. Tí kann tann setti eisini rokna við at fáa aðrar uppgávur, um tørvur gerst á hesum.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran, Oddfríðu Højgaard, á tlf. 226121.

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Bústovnurin á Rúnarvegi 6
620 Runavík
Stílað: Oddfríða Højgaard, leiðara

**Umsóknarfreist**:
27. februar 2007.

Trivnaðartænastan

**Avloysari fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi**

Eitt starv sum avloysari fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi á Sambýlinum Á Mýrini í Hoyvík er leyst at søkja til setan 1. mars 2007. Sambýlini á Mýrini eru heim hja 10 vaksnum menningartarnaðum fólkum.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

**Førleikakrøv:**
Vit søkja eftir fólki, sum:
- hevur royndir innan serøkið
- hevur evni vilja til at samstarva og samskifta við starvsfelagar, búfólk og teirra avvarðandi
- hevur áhuga í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum á arbeiðsplássinum

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi og avbjóðandi starv, sum millum annað fevnir um at vegleiða búfólkunum í øllum tí, sum tey hava tørv á, og á ein pedagogiskan hátt tryggja búfólkunum menningarmøguleikar og saman við teimum skipa eitt trygt innihald í gerandisdegnum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Setanin endar 13. juli 2007.

Vilt tú vita meiri um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til leiðaran á tlf. 211478.

**Umsókn:**
Send eina umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum til:

Sambýlini á Mýrini
Á Mýrini 4 - 6
188 Hoyvík
Stílað: Leiðarin

**Umsóknarfreist**:
27. februar 2007

**Les um onnur størv á www.naerverk.fo/ leys størv**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**



Lesið Sosialin - so eru tit við


